# SERSTØK BYGGISAMTYKT FYRI ÍBÚÐARBYGGING Á MATR. NR. 1038BK

Ætlanin við hesi serstøku byggisamtyktini er at skipa ognina matr. nr 1038bk til bygging av 6 íbúðareindum. Ognin er í umráðispartinum A1 í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu og hevur atgongd frá Frælsinum ígjøgnum Norðurrás.

Til serstøku byggisamtyktina eru umframt tekstskjal tvey kortskjøl. Kortskjal 1, Yvirlitiskort og kortskjal 2, skipan av økinum.

## § 1. ENDAMÁL

1.1 at skipa økið, sum serstaka byggisamtyktin fevnir um, til íbúðarbygging.

1.2 at tryggja, at staðsetingin av íbúðum verður sum sýnt í kortskjali 2.

1.3 at skipa tilkoyring og parkeringspláss til økið.

## § 2. HEIMILD OG AVMARKING

2.1 Serstaka byggisamtyktin er heimilað í §4, stk. 1, í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir.

2.2 Økið, ið serstaka byggisamtyktin er galdandi fyri, er avmarkað, sum sýnt er á viðfesta kortskjali nr. 1.

2.3 Økið er uml. 2.400 $m^2$ til støddar og liggur í A1-sethúsaøki í 3. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

2.4 Sambært kap. IV, §4 í almennu byggisamtyktini, er umráðisparturin A1-øki í 3. grundumráði lagdur til sethúsabygging, tó kann við serstakari byggisamtykt, fyri eitt natúrliga avmarkað øki, vera loyvt at byggja íbúðir.

## § 3. NÝTSLA ØKISINS

3.1 Bygging av 6 íbúðareindum og tilhoyrandi parkeringsplássi

## § 4. BYGGING, STØDD OG STAÐSETING

4.1 Byggjast kunnu 6 íbúðir innanfyri øki I í korti 1, skipan av økinum

4.2 Mest loyvda byggistig fyri økið sum heild 0,25

4.3 Mest loyvda hædd er 4 m frá lidnari planering

4.4 Byggjast kunnu eisini eitt úthús til hvørja íbúð á í mesta lagi 5 m$^2$

4.4 Smærri bygningslutir sum altanir v.m. kunnu byggjast út úr bygniningunum

## § 5. VEGIR OG PARKERING

5.1 Atgongd til økið skal verða ígjøgnum Norðurrás

5.2 Parkering verður skipa sum felags parkering á øki II í korti 2, skipan av økinum, sambært kap. III, §3, Øki til bilstøðil, í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu

## § 6. BYGGIMYNDUGLEIKI OG ÁTALURÆTTUR

6.1 Byggimyndugleiki og átalurættur eru sambært hesi byggisamtykt hjá Tórshavnar býráð einsamøllum.

## § 7. UNDANTAKSLOYVI FRÁ BYGGISAMTYKTINI OG BROYTINGAR

7.1 Smávegis lættar frá reglunum í hesi byggisamtykt kann byggivaldið geva loyvi til, um so er at dámurin á økinum, sum byggisamtyktin roynir at skapa ella varðveita, ikki verður broyttur av teirri orsøk.

7.2 Broytingar í byggisamtyktini kunnu verða gjørdar eftir samtykt býráðsins og góðkenning landsstýrisins eftir reglum um samtykt og góðkenning av nýggjum byggisamtyktum.

| HEILSU -OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ | |
|---|---|
| Mál nr.: | 16/01405 |
| Ætlanarskriv: | 3/2·2017 |
| Góðkent: | 14/2·2017 |
| Váttað: | [signature] |




# Serstøk byggisamtykt
# Matr. nr. 1038 bk, Tórshavn

Mark um samtyktarøkið

Øki I

Øki II

Góðkend: 14. feb. 2017

**HEILSU- OG INNLENDISMÁLARÁÐIÐ**

Tórshavnar kommuna
Postsmoga 32
110 Tórshavn

14. februar 2017
**Mál**: 16/01405-8
**Tygara Skriv**:
**Viðgjørt**: KHP

***Góðkenningarskriv***

**Nýggj serstøk byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 1038bk í Tórshavn**

Eftir reglunum í løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, hevur Tórshavnar kommuna í skrivi, dagfest 21. desember 2016, sent Heilsu- og innlendismálaráðnum uppskot til serstaka byggisamtykt fyri íbúðarbygging á matr. nr. 1038bk til góðkenningar.

Ætlanin við serstøku byggisamtyktini er at skipa ognina matr. nr. 1038bk til bygging av 6 smærri íbúðum. Økið liggur millum Bóndabrekku og Norðurás í Tórshavn.

Broytingin hevur ligið alment frammi frá 7. november til 28. november 2016. Tá freistin at koma við møguligum broytingaruppskoti ella mótmæli var farin, 19. desember 2016, hevði kommunan einki mótmæli ella broytingaruppskot móttikið.

Býarskipanarnevndin hevur í ummæli sínum, dagfest 25. januar 2017, mælt til at umsóknin um serstaka byggisamtyktin fyri matr. nr. 1038bk verður gingin á møti.

Heilsu- og innlendismálaráðið tekur undir við viðmerkingunum frá Býarskipanarnevndini.

Vísandi til omanfyri standandi verður sagt frá, at Heilsu- og innlendismálaráðið við heimild í § 4 í býarskipanarlógini góðkennir serstøku byggisamtyktini fyri matr. nr. 1038bk í Tórshavn.

Hjálagt serstaka byggisamtyktin fyri íbúðarbygging á matr. nr. 1038bk við átekning frá Heilsu- og innlendismálaráðnum.

Vegna Heilsu- og innlendismálaráðið

Hilmar Høgenni
deildarstjóri

Eirargarður 2 • FO-100 Tórshavn
Tel: +298 304050 • Fax: +298 304025 • E-mail: himr@himr.fo